MÁLTEIGURIN

Roykur í høvdinum

Ein bóklingur er komin at liggja runt um í landinum. Hann eitur »Tú megnar lívið uttan royk« og er útgivin av Tubbaksráðnum. Hann er eitt gott dømi um málsliga nýskapan. Greitt er, at umsetarin er blivin málsliga vaktur av at leggja av at roykja. Hann sigur til dømis, at fólk, sum roykja, hava »húð, sum er ógyrðin« og »við roykisteðgi verður húðin rúmari og gyrðiari, fródligari«. Og hárið á einum roykjara er »óblankt og dovisligt«.

Sagt verður, at nikotin »gular tenninar«, men til ber at »busta burtur skónina«. Tó kemur hon aftur »aftan á næstu guvu«. Hetta er heppin málslig nýskapan, tí ólærdir føroyingar siga ein *guvur*.

Í tubbaksroyki er fult av »krabbameinselvandi og heilt køvandi og altetandi evnum«. Menn, sum roykja, eru í vanda fyri »gitnarloysi«. Umráðandi er at »gera tær sjálvum greitt tín egna roykitvørskurð fyri at kunna laða upp alsamt fleiri umstøður, har tú kanst vera roykleysur«.

Tað hevur týdning at vita, hvat tú skalt gera við »hendur tínar«, og tú mást siga við teg sjálvan: »Eg skal bara dusmsúgva, síðani geri eg eitt andarhald við sigarett míni«. Tann, sum roykir, hoyrir til ein bólk, sum er »saman um eitthvat«. Um roykitrælin verður sagt, at hann finnur ugga í sínum »roykiverki«, og hann má ansa eftir, at »tubbakseiturfesta« ikki »fær fótin fyri seg«, so at mann kann standa móti »roykihøvunum« tá ið tey koma.

Hóast tubbakstrælurin brúkar nógvar pengar upp á sína last, heldur hann, at fáar sigarettir »bragda væl«.

Um »tubbakseiturvanafestu« verður sagt, at tubbakseitur er eitt »vanafestuskapandi eitur«. Tað »kveikir játtandi samsýningarárin í heilanum«.

Undir yvirskriftini »Tubbakseiturbót« fáa vit at vita, at tann, sum hevur stóran tubbakseiturtørv, »kann hava fyri neyðini *sjøtlingarhjálp við tubbakseiturbótartilbúningi*«.

Hyggjurað móti royking er ein »tubbakseiturnasaspræna«.

Um »illviljað árin av tínum roykisteðgi« verður sagt, at tað er »hart lív«, og at fólk kunnu »tyngjast í roykisteðginum«.

Ein amerikonsk kanning av sambandinum millum royking og kreft verður kallað »ein hendinga framrás«. Ansast má eftir ikki at skaða »ílegunа«, tí tá ið »úrbregði fer fram«, minkar verjan. Nú hevur vísindin funnið »evnasambandsgongdina«, sum gevur fólki »krabbamein«, verður sagt.

Ein onnur amerikonsk kanning frá University of Chicago hevur víst á evnasambandsgongdina millum tubbaksroyk og málsliga nýskapan. Tá ið roykjarin hevur fingið sjøtlingarhjálp móti tubbakseiturbókartilbúningi, gongur tað við rúkandi ferð við tí málsliga. Nýggj og vøkur orð troka seg fram. Skapanargleðin veksur, tann ógyrðna húðin verður fródligari, nú er well við at dusmsúgva, tubbakseiturspræna hevur givið sjøtlingarhjálp, tubbakstrælurin sprænir nú orð. Tað gongur sum ein royk við tí málsliga, sum verður vanafestuskapandi; heilin er fullur av játtandi samsýningarárinum, og tað óblanka og dovisliga hárið fær nýtt lív…


Men hjá lesaranum reisast hárini á høvdinum. Endamálið við bóklinginum er kanska at fáa fólk at leggja av at roykja, men høvuðsdenturin er lagdur á at útbreiða málroyk, at gera tað klára óklárt.

Tey, sum eru góð við føroyskt, verða sorgarbundin av at lesa hendan bóklingin, og tað kann gera, at tey fara at roykja meir, enn tey kanska gjørdu frammanundan. Tí, sum tað so rámandi stendur í bóklinginum: »Sigarettin er altíð við hondina, tá ið tú ert leiddur, harmur ella argur og vilt hava troyst og styrk beinanvegin«.

hj

BILLUTIR
útvegast til
FLEST ALLAR
BILAR
Fa. BILLUTIR
Tlf. 21605 Fax. 21666

GEVID BLÓÐ



KROSSORÐAGÁTA

Vinnari: Tórbjørg Djurhuus, Svínagil, 220 Skálavík

Loysnin frá seinastu viku
Loysunarorðið: LANGOMMAN

L	E	Y	G	A	R	Ð	A	G	U	R	Á	E	Y	Ð	I
A	K	R	Y	L		I	G	U	L	K	E	R		Ð	Ð
N		K			K		A	L	T		D	M	I		R
G		I	M	Þ	O	R	T		R	A		A	L	T	A
A	N	N	A	R	Þ	A	S	K	A	D	A	G	U	R	
F	A	G	R	A	R			M	V		B	A	S	A	R
R	I		I	N	A	R	I		I		B	T	H		I
Í	N		U	G		I	Þ		O	Þ	A		I	N	N
G	A	M	M	A	S	T	R	Á	L	U	R		N	Ó	G
G		E	E		R	A	A	S	E	Y		C		A	I
J	E	N	S	E	N		N	E	T	D	A	M	L		K
A		N	S		S	S		Y	T	E	R		F	Þ	L
D	R	I	A	S		E	I	Þ		D	A	Y		L	O
E	E	N		T	A	R	V	I		O	F	T	A		K
G	I	G	G	A		I	A	R	O	M	A	R		D	K
I	N	110	Y	B	U	R			B	E	T	A	N	I	A

Hvønn leygardag
er krossorðagáta í blaðnum. Drigið verður millum røttu innsendu loysnirnar. Vinningurin er ein bók frá Bókadeild Føroya Lærarafelags ella Føroya Skúlabókagrunni. (Krossa av á listanum høgrumegin, hvørja tú best kundi hugsað tær).

Fyri at verða við í dráttinum um vinningin, má loysunarorðið vera okkum í hendi í *seinasta lagi hósdagin*. Vinnarin verður saman við loystu gátuni kunngjørdur í blaðnum næsta leygardagin.

Sendið loysunarorðið til: **Sosialurin, Box 76, 110 Tórshavn** – og viðmerkið **»Krossorðagáta nr. …«** á bjálvan.

Loysunarorð: **111**

Navn:

Bústaður:

Bygd/býur:

Lesið føroyskt – hugsið føroyskt!

Frá BÓKADEILD FØROYA LÆRARAFELAGS:

- ❑ **Ljósini slókna**
- ❑ **Søgur úr Port Janua**
- ❑ **Bíblian í orðum og myndum**
- ❑ **Indiánararnir. Søgan um upprunafólkið í Norðuramerika**
- ❑ **Mangt er millum himmal og jørð**

Frá FØROYA SKÚLABÓKAGRUNNI:

- ❑ **Samfelagsfrøði 1. Tú og samfelagið**
- ❑ **Heimssøga 1**
- ❑ **Søgan um hini**
- ❑ **Lív og gróður**
- ❑ **Orðaskyn. Mín fyrsta orðabók**

Bøkur og annað tilfar – bæði innan og uttan skúlagátt.